23-01-2011

**QuadLock básur á byggimessu**



Ferðafrásøgn.
Herfyri kom teldupostur úr USA til Quad-Lock umboðsfelagið Kubbi, at verkætlanin 'Midvag Kindergarten' var úttikin sum vinnari í einum av teim 6 bygningsstøddarbólkunum í ársins kapping um ICF byggjaríir. ICF stendir fyri Insulating Concrete Forms, ella bjálvibetongstoypiformar.
Vinnari, í hesum føri sum vanligt er í USA, merkir nummar 1 ella 1'st runner up ella 2'nd runner upp, t.v.s. gull ella silvur ella bronsu, so tað var ikki sørt av spenningi um hvør endaliga støðan fór at verða, á avdúkingarsamkomuni, sum gekk fyri seg á byggimessuni World Of Concrete í Las Vegas.
Umboð fyri byggifelagið Dalsbø, arkitektur og verkfrøðingur frá Westtech, umframt umboð fyri Kubbi vóru til staðar.
Rómurin var stórur tá tað gjørdist greitt, at Midvag Kindergarten gjørdist nummar 1, og frásøgumaðurin á pallinum greiddi dúgliga frá um Føroyar, stødd og fjarstøðu landsins og veðurlagið og byggiumstøðurnar har. Tey flestu í forsamlingini ánaðu snøgt sagt ikki um Føroyar, og rósur og herðaklapp skortaðu tí ikki til hesar fjarskotnu garpar frá lítlu tjóðini, ið tey nú kenna, tí higartil hava nærum bert verkætlanir í USA og Kanada vunnið í hesi kappingini, sum hevur verið hildin á hvørjum ári síðani 2005.
Í USA/Kanada er hesin umhildni byggiháttur í støðugum vøkstri, tí hetta eru tryggir haldgóðir bygningar við sera góðari bjálving og tættleika.
Umframt barnagarðin í Miðvági hevur byggifelagið Dalsbø (dalsbo.info) bygt Quad-Lock sethús m.a. í Saltangará og í Hósvík og í Miðvági, og fer í næstum undir bygging í Sandavági og í Tórshavn. Harumframt hevur byggifelagið Kinn (kinn.fo) bygt Quad-Lock sethús m.a. á Strondum og í Runavík, og fer í næstum undir bygging í Klaksvík.
www.kubbi.info